

**Johan Norðfoss:**

# Kundi endað sum krígsfangi á oynni Man

**Johan vil gera einum kenningi eina vinatænastu. Hetta mundi hann komið heilt lort í býin av. Johan er eisini í Aberdeen, tá ið kríggið heldur uppat. Hann heldur fram at sigla og fer við trolaranum Havborgin. Men fyrst til henda vanlukku túrin, tá ið Johan kundi enda sum bretskur krígsfangi**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Eg fór so aftur við Hjalmar aftur í 1944, har Hjalmar Petersen úr Fuglafirði var skipari. Hetta við snurring var summarfiskarí, og vit gjørdu ein góðan túr. Tá seldu vit fyri 2.600 pund, sum var sera gott. Vit fiskaðu tað, sum kallaðist witches, ein langur klænur flatfiskur, reydligur á liti.

Eg var staddur niðri sjálvan D-dagin, tá teir sameindu gjørdi innrásina í Frankaríki 6. juni 1944. Tá var eg motorpassari við Hjalmar. Vit høvdu verið undir Íslandi og vóru farnir inn í Reykjavík. Har kom ein maður, svenskari búsitandi í Føroyum, umborð, og hann bað meg taka ein lítlan pakka heim við til konuna. Hetta var veruliga ikki loyvt, men hvat verður ikki gjørt millum vinir!

Eg segði, at eg kundi taka pakkan, men hann mátti ikki skriva nakað, sum kundi finnast í pakkanum. Tað lovaði hann, og eg fekk pakkan. Meiningin var, at vit skuldu fara inn í Føroyum á veg til marknað. Tá hevði neyvan verið nakar trupulleiki.

Men tað gjørdu vit ikki, vit fóru beinleiðis niður. Har kom Secret Service umborð. Eg hevði eisini eitt fotografiapparat við mær. Tað var heldur ikki loyvt. Hetta hevði eg grivið niður í kolkjallaranum.

Teir spurdu so, um nakað var umborð at kanna. Eg segði, at eg hevði ein lítlan pakka, og hann lá afturi í maskinrúminum. Eg fór so aftur eftir honum og legði hann á borðið. Teir pakkaðu upp. Tá var tað tilsetningsstoff til kaffi, sum var í pakkanum. Tey flestu munnu kenna Richs. Hetta vóru reyðar stongir. Hann hevði pakkað hetta væl inn, men aftast í pakkanum var eitt bræv.

Hetta sá jú sera illgrunasamt út!. So eg varð tikin í land til forhoyr, sum eg stóð í klovstúvlum. Skipið varð eisini kannað úr enda í annan. Eg sat har í sjey tímar. Minnist framvegis myndina av eini æðu í hesum hølinum, so eg kom ikki at gloyma, hvussu ein æða sá út. Eg fekk hvørki vátt ella turt.

## Komu á svartalista

Eg skilti aftaná, at hetta var ein partur av trygdartiltøkunum undan D-degnum. At enda kom ein yvirmaður, sum tosaði íslendskt. Hann hevði verið í Íslandi. Eg skilti nakað av íslendskum, tí eg hevði siglt nakað har uppi. Hann segði, at tíbetur stóð einki í brævinum uttan tað, sum var vanligt í einum brævi frá einum manni til eina konu. Men hevði nakað staðið av hernaðaligum áhuga, "hevði tú rokið út á oynna Man", sum varð nýtt til krígsfangar.

Eg royndi at siga, at maðurin,



*Her sæst Hjalmar, TN 70, á Havnarvág. Tann kom 20. Apríl saman við Árnanes sum fyrstu skip aftur úr Aberdeen við føroyskum flaggi – eftir bretskum boðum*

sum átti pakkan var missionerur. Gamaní, men teir vóru ofta teir ringastu!

Hjalmar kom eftir hetta á ein svartalista yvir skip, sum blivu serliga væl kannað, tá ið tey komu í bretska havn. Teir vóru ikki blíðir umborð á Hjalmar, tí sjálvt hvør avís varð endavend aftaná. Annars slapp eg við skrekkinum. So lítið skuldi til, men tað var kanska ikki so løgið, so spent støðan var. Tað, sum varð skrivað og ikki toldi dagsins ljós, var ofta í kotum. Tað skuldi so lítið til, at menn gjørdust illgrunasamir.

Tað fyrsta, konan spurdi, tá ið hon fekk pakkan, var: "Hvar bleiv brævið av?" Hon skuldi bara vitað! Men hon fekk so tað, sum var í pakkanum, og var hetta slíkt sum var forkunnugt í Føroyum.

Hans Jacob Ellingsgaard greiðir frá eini hending, sum eisini vísir hvussu varnir teir vóru. Ein dagin fekk Hans Jacob, sum var trúboðari í Aberdeen, at vita, at tey kundu rokna við at missa telefonina. Orsøkin var tann, at hann í eini telefonsamrøðu við eina føroyska kvinnu hevði nevnt eitt føroyskt skip, sum hon hevði áhuga fyri. Hann hevði nevnt navnið og at skipið skuldi sigla tá og tá úr Aberdeen. Samrøðan var avlurtað, og at nevna slíkt var strangt forboðið av trygdarorsøkum. Týskarar kundu jú havt lurtað eisini. Hann misti ikki telefonina, men tá Hans Jacob seinni skuldi fara at endurnýggja dokkpassið, sum var ein treyt fyri at sleppa oman í dokkina, dró hetta út í fleiri dagar, og júst henda samrøðan var orsøkin. Hetta endaði við, at hann fekk eina yvirháling frá bretskum heryvirmanni fyri at hava sett sínar egnu landsmenn í vanda.

## Var í Aberdeen við krígslok

Tann dagin, teir fóru í land í Normandínum, fóru vit út úr Aberdeen. Tað var ein sjaskmorgun. Eg skilti ongantíð, at teir sluppu í land. Tað varð eisini sagt aftaná, at veðrið hevði verið ruskut. Men hetta vistu vit ikki av fyrr enn aftaná.

Eg var eisini staddur í Aberdeen við Hjalmar tann dagin, kríggið varð av. Hjá teimum var tað 8. mai. Tá var frøi á fólkinum. Tey brendu allar hesar vaktskúrarnar, sum vóru ímyndin av krígnum, og tað var dansur í gøtunum. Hetta var stuttligt at eygleiða.

Tað vóru eisini onnur føroysk skip í Aberdeen um hetta mundið. Hjá onkrum teirra var tað so óheppið, at tey seldu ikki, fyrr enn friðurin varð lýstur. Tá høvdu